SKJAL E

**Hoyringssvar til Løgtingsmál nr. 10/2019, nr. 11/2019 og nr. 20/2019**

Landsstýrið sigur í grundgevingum sínum til henda lógarpakka m.a., at "Landsstýrið ynskir at betra fíggjarligu viðurskiftini hjá fólkapensjónistum". Og "at gera treytirnar lagaligari hjá teimum pensjónistum, sum hava inntøu afturat pensjónini".

Tað er góð og alneyðug broyting, at mótrokningin í fólkapensjónini verður lækkað niður í 20% fyri lágar inntøkur, men kundi mótrokningin hóskandi verið stigvíst hækkandi (progressiv) – hjá fólkapensjónistum, sum hava rímuliga høga inntøku afturat fólkapensjónini og samhaldsfasta.

Mótrokningarfría inntøkuupphæddin í verandi fólkapensjón eigur ikki at verða lækkað úr 61.900 kr. niður í 40.000 kr., men eigur henda upphædd heldur at verða hækkað upp í 100.000 kr. (sum í DK), - hetta fyri at tað betur skal loysa seg at arbeiða hjá fjøld av fólkapensjónistum, sum hava lága inntøku afturat fólkapensjónini og samhaldsfasta.

**Uppskotini til inntøkuhækkingar hjá pensjónistum mugu venda sosialt rætt**

Taltabellirnar í uppskotunum til inntøkuhækkan hjá fólkapensjónistum vísa, at uppskotini til inntøkuhækkingar til pensjónistar venda sosialt skeivt.

Uppskotið til betran av fíggjarligu viðurskiftunum hjá pensjónistum vísa, at tey sum hava rættuliga høga inntøku afturat fólkapensjónini – privata pensjón og lønarinntøku – fáa eina inntøkuhækking uppá áleið 2.000 kr. um mánaðin, meðan tey, ið onga inntøku ella nærum onga inntøku hava afturat pensjónini, einans fáa eina inntøkuhækkan uppá á leið 1.000 kr. um mánaðin.

**Pensjónistar og fátækramarkið**

Sambært Hagstovu Føroya høvdu heili 29,8% av gott 8.000 fólkapensjónistum, ella uml. 2.500 fólkapensjónistar, í 2017 inntøku, ið lá undir fátækraváðamarkinum. Teirra inntøka varð sostatt lægri enn 60% av miðinntøkuni í landinum. Fátækraváðamarkið var í 2017 kr. 143.350 (60% av miðinntøkuni í 2017).

Tøl hjá Hagstovu Føroya vísa sostatt, at 3 av 10 fólkapensjónistum ella uml. 2.500 fólkapensjónistar livdu í fátækraváða/fátækradømi í 2017. Hesir uml. 2.500 fólkapensjónistar hava sostatt inntøku, ið liggur undir føroyska fátækramarkinum og hava ikki pening til eitt rímuligt og sømuligt lív.

Av uppskotinum sæst, at ein stakur pensjónistur, sum ikki hevur inntøku afturat pensjónini, í 2020 fer at fáa 136.574 kr. Munurin millum hesa upphædd og fátækraváðamarkið fyri 2017 er minus 6.776 kr.

Ynskir politiska valdið at betra fíggjarligu viðurskiftini hjá hesum stóra hópi av fólkapensjónistum, ið liva í fátækraváða/fátækradømi, má hækkingin av inntøku teirra fram til 2021 verða munandi hægri enn uml. 1.000 kr. um mánaðin, soleiðis sum skotið verður upp í hesum uppskotum. Hesir fólkapensjónistar mugu beinanveg fáa í minsta lagi 1.700 kr. afturat um mánaðin, um teir skulu lyftast úr fátækraváða/fátækradømi.

Vónandi verður uppskot landsstýrisins broytt soleiðis, at teir áleið 2.500 pensjónistarnir, ið hava inntøku, ið liggur undir fátækraváðamarkinum, fáa so stóra inntøkuhækking, at teir verða lyftir úr fátækraváða/fátækradømi.

Neyðugt er ikki hjá landsstýrinum at betra fíggjarligu viðurskiftini hjá teimum fólkapensjónistum, sum hava høga inntøku afturat fólkapensjónini, tað veri privata pensjón og/ella høga lønarinntøku. Hesir fólkapensjónistar hava nóg mikið av peningi at liva av.

**Pensjónistar og arbeiði**

Ynskir landsstýrið, at fólkapensjónistar, ið hava góða heilsu og góðar arbeiðsførleikar, skulu arbeiða, so longi hugur og orka er til tess, má Landsstýrið/Fíggjarmálaráðið ikki framhaldandi diskriminera fólkapensjónistar á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Tað er av alstórum týdningi fyri pensjónistar, sum eru á almenna arbeiðsmarknaðinum, at "Rundskriv um 70 ára fráfaringaraldurin" hjá Fíggjarmálaráðnum verður strikað. Hetta soleiðis at tey eldru ikki framhaldandi vera fyri mismuni á almenna arbeiðsmarknaðinum, men fáa javnbjóðis og fría atgongd til henda stóra arbeiðsmarknað.

Tað er týdningarmikið at hava eitt arbeiði – hetta eisini hjá fólkapensjónistum, sum hava brúk fyri arbeiðsinntøku at hava afturat fólkapensjónini og samhaldsfasta. Arbeiði er ikki einans ein háttur at vinna pening til lívsins uppihald, men er nakað, sum gevur trivnað og er eitt stað, har fólk kunnu njóta sosiala samveru saman við samstarvsfeløgum.

Fáa fólkapensjónistar frían møguleika at arbeiða og verður mótrokningarfría inntøkuupphæddin í fólkapensjónini hækkað upp í t.d. 100.000 kr. hjá fólkapensjónistum við lágum inntøkum, verður samlaða arbeiðsvirknið hjá hesum stóra láginntøkubólki óivað hægri og verður meira skattapeningur soleiðis at lata í kommukassar og landskassan. - Og verða fólkapensjónistarnir á henda hátt við til at gjalda fyri okkara felags vælferð.

Føroya Astma/Allergifelag

14. 11. 2019